# *Johan Djurhuus*

*fv. skrivstovustjóri landsstýrisins*

* 21. januar 1918. † 13. januar 1998.

*Maud Heinesen*



*Johan F. Djurhuus*

Tá ið stovnsetingin av Fróðskaparsetri Føroya verður umrødd, verða sum rímiligt er tvey ávís nøvn altíð havd á lofti. Tað eru teir báðir stigtakararnir og fremstu forsprákararnir fyri stovninum Hanus Debes Joensen landslækni og Jóannes Rasmussen jarðfrøðingur. Uttan teirra miðvísa arbeiði mundi tað verið seinur dagur, áðrenn vit fingu nakað fróðskaparsetur. Samstundis er tó greitt, at uttan hjálp og stuðul frá øðrum góðum fólki hevði hetta stóra tak ikki eydnast so væl sum tað gjørdi: at fáa eitt einmælt løgting at samtykkja stovnsetingina av setrinum – og at fáa einasta føroyska professaran tá higar heim at virka. Millum hesi fólk er fremst at nevna Johan Djurhuus skrivstovustjóra, sum nú er farin.

Tað var tískil ikki so løgið, at júst Johan

Djurhuus alt fyri eitt fekk eitt tætt tilknýti til henda nýggja stovn. Eitt setursráð varð sett at stýra stovninum, men longu á fyrsta fundi sínum í mai 1965 valdi ráðið eina avgreiðslunevnd at fremja tey mál og mið, sum ráðið setti sær. Í hesa nevnd komu formaður og næstformaður í ráðnum og hartil ein aðalskrivari. Aðalskrivarin var Johan Djurhuus, ið um somu leið skuldi vera løgkønur ráðgevi. Johan Djurhuus varð verandi limur í avgreiðslunevndini heilt til 1984. Frá 1974 og somuleiðis til 1984 var hann eisini limur í setursráðnum, harav formaður 1977-79.

Tað fyrsta stóra takið var at fáa bygt eini hús – og ikki minst útvegað fígging til byggingina. Ein bygginevnd varð sett, og millum limirnar var Johan Djurhuus. Longu á sumri 1967 varð flutt inn í húsini. Johan Djurhuus var eisini valdur í bygginevndina fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuna, sum upprunaliga varð ætlað sum deild á Fróðskaparsetrinum.

Í 1974 setti setursráðið 11 ymiskar nevndir at kanna tørvin á hægri lestri í Føroyum. Samskipari av arbeiðinum var avgreiðslunevndin. Millum útbúgvingar, álitið mælti til, var ein útbúgving í almennari fyrisiting.

Henni var Johan Djuhuus heitur talsmaður fyri, og tað harmaði hann nógv, at hon hóast undirtøku í landsstýrinum datt niðurfyri. Treytirnar frá fíggjarnevndini vóru, at hon skuldi ongan eyka kostnað bera í sær.

Johan Djurhuus slapp ikki Fróðskaparsetrinum, tá ið hann fór úr setursráðnum og avgreiðslunevndini. Hann varð nevniliga valdur í ta nevnd, sum landsstýrið setti í 1985 at gera uppskot til at menna Fróðskaparsetrið sum hægri lærustovn. Nevndin legði drúgt álit úr hondum longu árið eftir. Tað mest ítøkiliga, sum spurdist burtur úr arbeiðinum, var kanska broytingin í stýrisskipan og bygnaði setursins. Samstundis sum búskaparliga kreppan av álvara tók seg upp, svunnu líkindi til at fremja tær flestu av nýggju útbúgvingunum í uppskoti.

Eitt ávíst bjartskygni var kortini til steðar heilt til 1990, kanska serliga í teirri nevnd, setursráðið setti í 1987 at fyrireika bygging av nýggjum fróðskaparsetri. Eisini í hesi nevndini var Johan Djurhuus virkin limur. Á sjálvum 25 ára stovningardegi setursins í mai 1990 boðaði táverandi borgarsstjóri frá býráðssamtykt um at lata setrinum ókeypis grundstykki uppi í Marknagili. Eitt tað seinasta, sum fyrireikandi bygginevndin gjørdi, áðrenn hon gavst, var at fara niðan í Marknagil at skoða gávuna.

Fróðskaparsetrið hevur ómetaliga nógv at takka Johan Djurhuus fyri. Hann var ein álitismaður út í odd og egg og altíð fúsur at veita eina hjálpandi hond, tá ið á stóð. Sum tann frálíki løgfrøðingurin og korrekti embætismaðurin hann var, dugdi hann uttan háva at skapa virðing um seg og sítt starv millum øll, hann hevði við at gera.

Tað kann tykjast, sum um nógv av arbeiðinum, Johan Djurhuus saman við øðrum góðum fólki hevur lagt í Fróðskaparsetrið, ikki rættiliga hevur borið frukt, men tað er avgjørt ikki rætt. Tann menning av stovninum, sum hóast ymisk bakkøst hevur verið frá 1965 til dagin í dag, ber týðulig boð um tað. At umstøðurnar hava sett sínar forðingar og seinkað henni, er ein onnur søk.

Vit lýsa frið yvir minnið um Johan Djurhuus.